Starvsmannafelagið: Kortanei til at lækka lønirnar fyri at fáa skattalætta

Formaðurin í Starvsmannafelagnum ávarar harðliga ímóti útspælinum frá Havnar arbeiðsmannafelag og Føroya Arbeiðarafelag um at góðtaka lønarsteðg afturfyri at fáa skattalætta

Ætlanin at lækka lønirnar afturfyri at fáa skattalætta, fer at fáa álvarsligar avleiðingar fyri allar løntakarar, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum. Reaktiónin frá arbeiðsgevarun um sigur alt, heldur Gunnleivur Dalsgarð

LØNARSTEÐGUR OG SKATTALÆTTI
Aki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Hatta má eg harðliga ávara ímóti!

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, ávarar staðiliga ímóti nýggjasta útspælinum frá teimum stóru fakfeløgunum á privata arbeiðsmarknaðinum.

Í útvarpinum nú um ársskiftið, hava bæði formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag og forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag boða frá, at tey eru opin fyri at gera eina avtalu, sum ber í sær, at lønirnar skulu ikki hækka meiri, men afturfyri skal skatturin lækka, so at keypiorkan ikki minkar.

Hetta er ein rættiliga kollveltandi hugburðsbroyting hjá fakfeløgunum, tí higartil hava tey blankt víst hesum tankanum frá sær, tí tey hava fört fram, at skattapolitikkur og samráðingar á arbeiðsmarknaðinum hava onki við hvørt annað at gera.

Arbeiðsviðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum ávirka øll hvørt annað, so hóast talan í hesum føri bara er um ein part av privata arbeiðsmarknaðinum, er ongin ivi um, at tað eisini hevði ávirkað alemnna arbeiðsmarknaðin, eins og allan arbeiðsmarknaðin annars.

Men formaðurin í stórsta almenna fakfelagnum, Starvsmannafelagnum, er ikki so heilhugaður fyri hugskotinum um lønarsteðg fyri skattalætta sum tey á privata arbeiðsmarknaðinum eru.

Tvørturímóti ávarar hann harðliga harðliga ímóti ætlanini.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at útspælið frá Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Arbeiðarafelag, er alt ov illa umhugsað.

– Reaktiónin frá arbeiðsgevarunum átti at sagt Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag, alt. Tað, hann sipar til, er tann skjóta reaktiónin frá Vinnuhúsinum, har Jan Mortensen, eisini í Útvarpinum, boðaði frá, at teir fóru ikki at leggjast á boðini, men fóru skjótt at seta seg í sambandi við fakfeløgini um málið.

– Arbeiðsgevararnir vóru rættiliga á gosið beinanvegin og tað er ikki so løgið, tí hetta er ógvuliga kærkomið hjá teimum.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum sigur, at er trupulleikin tann, at vinnulívið ikki er kappingarført, heldur hann, at vinnan skuldi tikið í egnan barm og kanna eftir, um leiðslurnar eru nóg góðar, heldur enn at leggjast eftir lønunum.

– Ella er endamálið at bjarga kappingarførinum við at draga livistøðið í Føroyum niður, tí hetta verður endin, vinnur hesin tankin frama.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at vit vita, at treytin fyri at varðveita samfelagið á høgum støði, er, at útbúgvingarstøðið er høgt.

– Skulu vit gera Føroyar til eitt láglønarland, verður alt støðið í samfelagnum hareftir, tí útbúgvin arbeiðsmegi leitar ikki í láglønarland at fáa arbeiði.

Og at útflyta arbeiðsplássini til láglønarlond fyri at varðveita kappingarførið, heldur hann líka lítið um.

– Hetta er tann skeiva gongdin og føroyingar áttu at verið meiri at sær komin, enn at útnytta armóðina hjá øðrum til at varðveita eitt høgt livistøðið í Føroyum. Heldur skuldu vit roynt at hjálpt láglønarlondunum og hjálpt teimum upp á sama støði, sum vit eru á.

Gunnleivur Dalsgarð vísir á dømini um, ar rækjuskip eru farin undir fremmant flagg.

– Vit siga, at vit klára okkum ikki í kappingini. Fyri at klára okkum, aftra vit okkum ikki fyri at útnytta tey, sum eru nógv verri fyri enn vit. Hetta er onki annað enn at útnytta neyðina hjá øðrum, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Hann sigur, at føroyingar ætla at verða eitt sjálvbjargið samfelag, tí vit vilja ikki danskar vaskikonur og donsk verkafólk at betala fyri okkum. Men tá ið tað sansar at, fara vit til eitt land, sum er nógv fyri enn Danmark, til at fáa okkum fyrimunir.

Álvarsligar avleiðingar

Gunnleivur Dalsgarð leggur enn dent á, at skattapolitikkur og samráðingar um løn, skulu skulu ikki tengjast saman, tí hetta eru tvey mál, sum, ikki hoyra saman.

– Hetta er rættiliga longu nú manglar til øll hesi økini, hvussu skulu vit so figgja teyt frameftir?

Gunnleivur Dalsgarð vísir á, at nógv hevur verið funnist at ymsum brúkaragjøldum, sum eru sett í verk.

– Skal skatturin lækka, síggi eg fyri mær, at so má hvør einstakur borgari betala fleiri og fleiri tænastur sjálvur og so mugu brúkaragjøld leggjast alt møguligt fyri at halda samfelagshjólini malandi.

– Hvussu skulu vit annars figgja allar tær felags ábyrgdir vit hava í vælferðarsamfelagnum. Lækkar skatturin, verður sjálvandi ov lítið onkustaðni.

– Avleiðingin verður, at antin mugu vit lækka vælferðarstøðið, ella mugu vit áleggja brúkaragjøld fyri at figgja tað, sum tann felagsskatturin annars figgjaði.

Og Gunnleivur Dalsgarð sigur, at hóast skattatrýstið er høgt, heldur hann, at skatturin er væl farin, tá ið hann fer til at figgja nakrar tænastur, sum vit øll fáa gleði og gagn av.

– Samstundis eru tað nógv viðurskiftir, sum figgjarliga ávirkan á hvønn einasta borgara, sum ikki broytast fyri tað um lønin lækkar.

Gunnleivur Dalsgarð hugsar um, at vit hava onga sum helst ávirkan á prísin á byggitilfari, olju, ella øðrum, so ein lønarlækking kann føra verri umstøður.

Onki álit á politikarum

At gera sáttmálar um løn er ein spurningur ímillum fakfeløg og arbeiðsgevarar. Men tað eru hvørki fakfeløg ella arbeiðsgevarar, sum gera av, hvussu stórir skatturin skal vera. Tað er tað eina og alein Løgtingið, sum ger av.

Skal avtala um skattalætta og lønarsteðg gerast, krevst tískil eisini, at ein avtala verður gjørd við politikarar um skattapolitikkin.

Men Gunnleivur Dalsgarð ásannar eisini, at hann hevur ikki so frægt álit á politikararnar, at hann hevði hættað sær at gjørt eina avtalu við teir um skattalætta afturfyri lønarsteðg.

– Tí stúrir hann fyri, at hetta fer at fáa heilt álvarsligar avleiðingar fyri allar løntakarar og hann væntar eisini, at hetta fer at at elva til nógv meiri ófrið á arbeiðsmarknaðinum, serliga tá ið tað fer at vísa seg, at lyftini frá politikarunum ikki vera hildin og at teir fara at áleggja brúkaragjøld fyri alt møguligt fyri at vinna tað innaftur, sum teir missa við skattlættanum.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum sigur, at hetta er eitt so mikið stórt og grundleggjandi mál, at tað er óhugsandi at tað verður framt uttan so, at full semja verður um tað.

– Alt annað er at provokera partarnar á arbeiðsmarknaðinum til ófrið.

Men Starvsmannafelagið góðtekur ikki eina slíika mannagongd.

Hann heldur eisini, at hetta er eitt mál, sum fakfeløgini áttu at viðgjørt meiri, áðrenn nakað verður boðað frá, sum ikki er nóg væl gjøgnumhugsað.

Hann sigur, at fakfeløgini hava samstarvað so frægt, at tey hava kunnað tosað seg til semj um tey grundleggjandi málini.

Tí heldur hann eisini, at fakfeløgini eiga at seta seg saman at tosa um hesi viðurskiftini, áðrenn lopið verður framav, heldur Gunnleivur Dalsgarð.



Fyrrverandi fólkatingslimurin, Jacob Haugaard, heldur at Johan í Kollafirði eigur at lova føroyingum fleiri fiskar og lekrari grind

Mynd: Jan Müller

Johan er ein frískur vindur

Hálvføroyski skemtarin og fyrrverandi fólkatingslimurin, Jacob Haugaard, heldur, at Johan í Kollafirði eigur at lova føroyingum fleiri fiskar og lekrari grind, og hann væntar sær eitt feitt og undirhaldandi valstríð frá stuttliga kollfirðinginum

LØGTINGSVAL
Kristian E. Andersen

– Politikkur er í veruleikanum eitt fullkomið sjónleikarhús. Politikkarar lova tað, teir ikki klára at halda. Eg lovaði viðvind á súkklubreytunum og stytri bíðirøður í keypssamtøkunum á sinni. Johan í Kollafirði eigur at lova føroyingum fleiri fiskar og lekrari grind, er fyrsta viðmerkingin hjá Jacob Haugaard, tá Sosialurin í telefonini spyr hann um Johan í Kollafirði og Hin stuttliga flokkin.

Kendi skemtarin Jacob Haugaard, sum so mong við eitt komu í tankar um, tá tíðindini um Hin stuttliga flokkin frættust, gleðir seg at síggja, hvussu valstríðið hjá Johan í Kollafirði og Hinum stuttliga flokkinum fer at vera. Hann heldur, at Johan í Kollafirði má gera alt fyri at vera so stuttligur sum yvirhøvur gjørligt undir valstríðnum.

– Eg vóni, at Johan í Kollafirði fer at geva føroyingum eitt totalt feitt og undirhaldandi valstrið. So undirhaldandi, at føroyingar skrædna og liggja eftirá í berum látri. Sjálvur gleði eg meg at síggja, hvussu tað fer at gangast honum, og eg vóni, at tað verður stuttligt, sigur Jacob Haugaard.

Í Guds mynd

Jacob Haugaard er púra ósamdur við formanni Miðfloksins, Jenis av Rana, sum í Sosialinum fyri fáum døgum síðani lýsti hin Hin stuttliga flokkin at vera eina niðurgering av fólkaræðinum.

– Hatta er fullkomiliga burturvið, sum Jenis av Rana sigur har. Heilsa honum frá mær og sig, at vit eru øll skapt líka í Guds mynd, og at fólkaræðið er fyri øll.

Fólkaræðið snýr seg millum annað um at fáa meiriluta. Jenis av Rana hevur eisini sínar ætlanir við slíkum viðmerkingum, nevnliga at vinna sær meirilutan. Um Jenis av Rana ikki kann taka tað, at Johan í Kollafirði stillar upp, hevur hann misskilt fólkaræðið, og so egnar hann seg ikki at vera politikkari, sigur Jacob Haugaard.

Hálvføroyski skemtarin heldur, at føroyingar, sum vanliga eru eitt so mergjað fólkaslag, hava brúk fyri einum frískum vindi, sum Johan í Kollafirði er. Hann heldur, at Johan hevur rætta hugburðin, vil royna okkurt nýtt og hevur tað áhoyrarateknið, sum politikkarar hava brúk fyri.

– Í politikki hevur mann brúk fyri monnum, ið duga at selja eina vøru.

Billetseljarar vil eg kalla teir. Tit hava handan har skallutta við djúpu røddini, butterfly og sigar, Breckmann eitur hann. Hann plagar at duga tað.

Johan hevur uttan iva eisini slíkar seljaraeginleikar, leggur Jacob Haugaard afturat.

Angrar einki

Einki er at ivast í, at Jacob Haugaard tosar út frá royndum. Einans kendur sum skemtari, kom hann í 1994 púra óvæntað inn í Fólkatingið við vónleysum, skemtiligum vallyftum. Har skuldi hann knapliga sita millum royndar risar í donskum politikki og taka støðu til týðandi politisk mál. Jacob Haugaard ásannar, at hann als ikki hevði væntað at koma inn, og at tað var ótrúliga trupult.

– Eg gravaði faktiskt mína egnu grøv. Tá mann situr uttanfyri er tað so ótrúliga lætt at vera stuttligur og rópa upp um tað, mann vil. Men tá mann so kemur inn og veruliga skal taka avgerðir, tá er tað trupult. Politikkur er jú har kapitalur, vald og ein rúgva av áhugamálum møtast. Har er ikki lætt at ferðast og mann skal vera varin. Tykkara Høgni Hoydal er eitt gott dømi um hatta. Beint áðrenn hann kom í stjórn sá tað bjart út við ætlanum hansara, men aftaná at hava roynt tær í tí veruliga politiska spælinum, sær ikki so bjart út longur. Hatta er munurin á at vera innanfyri og uttanfyri, greiðir Jacob Haugaard frá.

Hóast hesar trupulleikar við at royna seg í politikki angrar Jacob Haugaard einki og er glaður fyri tær royndirnar, hann gjørdi sær.

– Eg havi lært ótrúliga nógv, um hvussu politikkur veruliga virkar. Eg vil siga, at hatta var eitt slag av meistaraútbúgving í samfelagsfrøði, eg tók har, sigur Jacob Haugaard kanska við ætlanum um veruliga at geva Johan í Kollafirði brell.

> *– Í politikki hevur mann brúk fyri monnum, ið duga at selja eina vøru.*
>
> *Billetseljarar vil eg kalla teir. Tit hava handan har skallutta við djúpu røddini, butterfly og sigar, Breckmann eitur hann. Hann plagar at duga tað.*
>
> *Johan hevur uttan iva eisini slíkar seljaraeginleikar*

Helst ikki inn

Hóast fyrrverandi Fólkatingslimurin gleðir seg at uppliva kollfirðingin undir valstríðnum, heldur hann, at Johan í Kollafirði má vóna ikki at koma inn á ting.

– Johan má vóna, at hann ikki kemur inn. Vanlig fólk sum eg og hann hava tað ofta trupult við at skilja tað veruliga politiska spælið og álvarsemi í truplum avgerðum. Og mann kann koma sær í álvarsamar trupulleikar. Um tað skuldi hent seg, at hann kemur inn, má hann beinavegin finna sær onkrar klókar gamlar menn við politiskum royndum at ringja til, hvørja ferð ein avgerð skal takast, sigur Jacob Haugaard at enda, sum í sinari tíð sum politikkari altíð spurdi seg fyri hjá vinmanninum og táverandi borgarstjóranum í Árhus, Thorkild Simonsen.